ítróttur

Nr. 70 • hósdagur • 14. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Skipanin komin

Í gjár var fótbóltsskipanin 2005 at fáa kring landið. Harvið er henta amboðið, sum er alneyðugt hjá øllum, ið hava við fótbólt at gera, tøkt. Skipanin, sum kostar 30 krónur, líkist sær sjálvari, og tað skal hon sjálvandi gera.

-jh

# Spæliloyvini eru altavgerandi

**Úrskurðurin hjá FSF í málinum um spæliloyvini hjá B36 og KÍ staðfestir, at spæliloyvini skulu vera í lagi, tá spælt verður. Og at hetta atlitið er fundamentalt í skipanini av føroyskum fótbólti**

SPÆLILOYVI
*Jákup Mørk*



Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Bjarki Mohr, formaður í kappingarnevndini hjá FSF, hevði verið ein av teimum, sum róu framundir, at B36 og KÍ kanska áttu at verið revsað umsitingarliga, heldur enn dømd at tapa dystirnar.

Bjarki vildi tó ikki gera nakrar sum helst viðmerkingar til málið, fyrr enn hann hevði kunnað feløgini, men mikumorgunin var hann fúsur at gera viðmerkingar.

- Tað er eingin loyna, at eg haldi revsingina hjá feløgunum vera harða, men samstundis bakki eg dómin upp. Tað er jú starvsnevndin, sum hevur tikið avgerðina, og henni eri eg partur av, staðfestir Bjarki.

### Eru grundleggjandi

Í úrskurðinum hjá FSF verður sagt, at spæliloyvini eru av fundamentalum týdningi í føroysku fótbóltsskipanini, og at hetta vigar meira, enn tað at brotið er framt av gáloysni heldur enn beráddum huga. Og spurdur beinleiðis um hetta, staðfestir Bjarki, at hetta var ein av høvuðsorsøkunum til niðurstøðuna.

- Bæði í kappingarnevndini og í FSF verður sagt bart út, at feløgini ikki hava framt brotið við vilja. Men siðvenjan fyri mál um vantandi spæliloyvi, staðfestir, at hetta verður revsað við at tapa dyst. Saman við altjóða praksis er hetta tað, sum vit hava givið størstu vektina í okkara viðgerð.

### Fegin um viðgerðina

Samstundis, so leggur Bjarki tó dent á, at hann er fegin um, at málið fekk somikið drúgva viðgerð, áðrenn endaligi úrskurðurin fyrilá.

- Sjálvur eri eg av teirri fatan, at vit í størstan mun eiga at fylgja vanligum rættarpraksis. Eingi mál eru eins, og tí er umráðandi, at vit fáa lýst hesi væl, áðrenn endalig støða verður tikin. Málið varð lýst frá A til Z, og nógv góð og saklig argumentir vórðu førd fram bæði fyri og ímóti feløgunum.

*Men ein somikið drúgv viðgerð. Kann hon benda á, at FSF í framtíðini fer at bloyta reglurnar um spæliloyvi upp?*

- Tað haldi eg ikki. Tvørtur ímóti hevur dómurin staðfest, at spæliloyvið skal vera í lagi. Talan er um groft brot á reglurnar, um hetta ikki er so, og tað er nú staðfest, at hetta verður revsað, hóast talan ikki er um tilætlað brot, staðfestir Bjarki Mohr at enda.

## Vilja kæra leysgevingini

*Er ein teldupostur eins bindandi sum eitt undirskrivað skjal?*

Tað tykist vera spurningurin, nú B36 fer at kæra avgerðina hjá FSF, har liðið varð dømt at tapa dystin ímóti Skála í Løgmanssteypið.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa orðið á B36-formannin mikumorgunin, men á heimasíðu felagsins verður staðfest: »B36 heldur tó, at umstøðurnar viðvíkjandi leysgevingini av Eyðuni Højgaard eftir at hann spældi á 2. liði á heysti í fjør eru so ivasamar, at felagið fer at leggja úrskurðin fyri dómsnevndina hjá FSF til endaliga avgerð.«

Og sum vit hava skilt tað, so fer B36 nú at seta spurnartekin við, um spæliloyvið hjá Eyðuni Højgaard nakrantíð hevur verið úr B36 seinasta góða árið.

Orsøkin – vilja tey vera við - er, at leysgevingin av leikaranum byggir ein samskifti umvegis teldupost, og ikki umvegins tær umsóknir um flytan av loyvisbrøvum, sum vanliga verða nýttar.

Spurningurin tykist tó vera, um B36 kemur nakran veg við hesum. Vanliga fatanin hevur í fleiri ár verið, at ein teldupostur er eins bindandi, sum var talan um vanligt brævasamskifti. Og neyvan er nakað at ivast í, at málið viðvíkjandi hesum spæli-loyvinum ikki er eindømi um mál, sum er avgreitt umvegis teldupost.

Nevndin hjá B36 hevði fund týskvøldið, har spurningurin um kæru varð viðgjørdur, men tað hevur so ikki eydnast okkum at fáa fatur á niðurstøðuni frá fundinum.

-jm

## Listin verður dagførdur

Í kjalarvørrinum á málinum um spæliloyvini hjá KÍ og B36, er komið fram, at talan á ongan hátt hevur verið um fullfíggjað spælarayvirlit, sum FSF hevur latið feløgunum til góðkenningar í januar mánaði.

Millum annað ljóðar, at spælarar, sum fyri fleiri árum síðani hava skift felag, framvegis standa skrásettir hjá gamla felagnum, men sambært FSF-skrivstovuni merkir hetta ikki, at spælararnir hava spælt ólógliga síðani flytingina.

- Vit hava havt nakrar trupulleikar við konverteringum av data, tá vit hava flutt millum skipanir. Tað er orsøkin til, at fleiri villur eru í hesum listunum, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF.

- Men tað merkir so ikki, at spæliloyvini ikki eru flutt. Tað er sjálvt loyvisbrævið, sum er tað avgerandi, og tí er avgerandi hjá feløgunum, at tey hava hesi í lagi.

Aðalskrivarin sigur annars, at tey eru í ferð við at rudda upp í listunum, og júst tað var orsøkin til, at tey fleiri ferðir hava heitt á feløgini um at ganga spælaralistarnar ígjøgnum.

- Nú fara vit so enn einaferð at rykkja feløgunum eftir hesum. Vit senda teimum listan yvir spælaraskrásetingar, sum vit hava, og so fáa feløgini eina ávísa freist at svara hesum. Ætlandi verða endaligu listarnir síðani lagdir á heimasíðu okkara, og tað kann vónandi gera, at somu trupulleikar og ivamál ikki fara at stinga seg upp í framtíðini, sigur aðalskrivarin.

Og so kundu vit hóskandi skoytt afturat, at tað er helst lítil ivi um, at feløgini hesaferð fara at akta FSF í boðunum um at gjøgnumganga listan!

-jm

## Formaðurin var ólógligur

Tað var eingin minni enn formaðurin í ÍF-Føroyum, sum ikki ihevði spæliloyvið í lagi, tá hann flutti aftur til Føroya.

Eyðun Højgaard, sum er »ólógligi« spælarin, sum B36 nýtti á Skála, er nevnliga formaður í føroyska útisetafelagnum.

Tað merkir tó ikki, at Eyðun samstundis var tann, sum avgreiddi spæliloyvini hjá felagnum. Tað hava aðrir ábyrgdarpersónar havt ábyrgdina av.

Og sambært teimum upplýsingum, sum vit hava fingið úr útisetafelagnum, so varð váttan send DBU um, at spælarin hevði frítt at fara, so skjótt Eyðun hevði boðað frá, at hann nú aftur flutti til Føroya.

-jm

## Royn fer til Dómsnevnd -ina

Sum vit skrivaðu í blaðnum í gjár, so gjørdi Kappingarnevndin hjá FSF mánakvøldið av, at kæran hjá Royn um dystin móti B71 ikki varð gingin á møti. Orsøkin var fyrst og fremst, at FSF ikki vil døma felag at tapa dyst orsakað av mistakið á dómaraseðlinum, men hesa grundgeving vilja hvalbingar ikki góðtaka.

Haðani verður sagt, at talan ikki er mistak av slíkum slag, sum á sinni feldi HB. Ta ferðina stóð "ólógligi" spælarin á seðlinum, men mistakið var bara, at hann stóð við skeivum eftirnavnið. Hesaferð høvdu sandoyingar als ikki skrivað spælaran á seðilin, og tað vilja hvalbingar hava Dómsnevndina at siga sína hugsan um.

-jm